## Eftirlýsa fólk sum liva við krabbameini

Føroya felag móti krabbameini ger í løtuni kanning um, hvussu tað er at liva við krabbameini. Fleiri fólk hava longu svara spurnarbløðum, men felagið er framvegis áhuga í fleiri luttakarum fyri at fáa eina so breiða og greiða mynd sum møguligt.

Fleiri og fleiri fáa staðfest krabbamein, og tey flestu merkja avleiðingar av sjúkuni langa tíð, eftir at tey eru vorðin frísk. Kanningin letur tey, sum onkursvegnu eru ella hava verið rakt av krabbameini, koma til orðanna. Hetta fyri at kortleggja upplivingar hjá tí sjúkurakta í sambandi við, at sjúkan er vorðin ein partur av teirra gerandisdegi, og fyri at geva sjúklingum best møguliga viðgerð og ráðgeving í framtíðini. Tey, sum ynskja at luttaka, skulu skunda sær, tí kanningin skal vera liðug í ár.

## Nýggir samtalubólkar fyri børn

Børn og ung, sum hava foreldur, ið eru lívshóttandi sjúk, eru ofta ógvuliga einsamøll við sínum tonkum og ótta. Tí bjóðar Krabbameinsfelagið børnum upp til 18 ár, at hittast í einum forum, har tey fáa sett orð á sínar kenslur og kunnu hitta onnur børn í somu støðu. Tilboðið byrjaði sum ein royndarverkætlan í fjør, og vóru royndirnar so góðar, at Krabbameinsfelagið hevur gjørt av at taka táttin uppaftur. Familjur, sum ynskja at børn teirra koma í samtalubólk, kunnu venda sær til Krabbameinsfelagið. Børnini hittast eina ferð aðru hvørja viku í einar tveir til tríggjar tímar hvørja ferð. Her kunnu tey tosa saman um eitt nú kenslur, ótta og vón, uttan at taka atlit til onnur enn seg sjálvi.

# Mamma he

**Tá ið ein mamma fær krabbamein rakar tað alla familjuna á serligan hátt. Hetta vita 17 ára gamli Leivur, 13 ára gamla Guðrun og 8 ára gamla Lív. Fyri skjótt tveimum árum síðani gjørdist sorg og stúran partur av teirra gerandisdegi, tí mamma teirra, Turið Horn, hevði fingið krabbamein**

**BRÓSTKRABBI**
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Børnini fylla nógv, tá ið Turið greiðir frá tíðini, sum hon hevði krabbamein, og sjúkraviðgerðin verður lýst við merkisdøgum hjá børnunum. Dagurin, tá ið hon fekk at vita, at krabbameinið hevði spreitt seg, var átta dagar eftir, at Lív fylti sjey. Hon fór til Danmarkar sama mánað, sum Lív byrjaði í fyrsta flokki. Og sjálvur dagurin, tá ið krabbameinið varð staðfest, var 15 ára føðingardagurin hjá Leivi.

Men meðan mamman stúrdi fyri børnunum, syrgdu og stúrdu børnini hinvegin um mammuna. Tey snakkaðu bara ikki so nógv um tað. Nú skjótt tvey ár aftaná tann ræðuliga dagin, og eitt ár eftir at mamman varð liðug við viðgerðina, sita tey rundan um stovuborði saman við mammuni og fortelja, hvussu tað var at hava eina deyðasjúka mammu.

Dagurin, tá ringu boðini komu, fyllir nógv. Leivur hevði bjóðað vinum í føðingardag um kvøldi, og tveir vinmenn komu við honum heim úr skúlanum. Tá teir komu inn, fóru vinmenninir beint upp í kamarið hjá Leivi at spæla playstation, meðan hann fór inn í køkin. Men har var okkurt heilt galið. Mamman, pápin, omman og abbin og 11 ára gamla systirin vóru øll har, og tey grótu øll.

### Hon fer at doyggja

Guðrun, sum nú er tannáringur og skjótt fyllir fjúrtan, minnist eisini væl hesa løtuna. Hon kom fyrst heim úr skúlanum.

- Tey stóðu øll og grótu, og eg tonkti, at onkur var deyður. Eg lat bara sum einki og setti meg inn í stovuna. So komu tey inn í stovuna til mín og greiddu mær frá, at mamma var sjúk, men at tað fór at ganga, og at hon fór at verða frísk aftur, greiðir Guðrun frá. Hon minnist at hon hugsaði: Krabbamein, so fer mamma at doyggja.

Yngsta dóttirin, Lív, var seks ár og gekk í barnagarði. Tey størri børnini komu heim úr skúla, meðan foreldrini framvegis vóru púra skelkaði, men áðrenn Lív kom úr barnagarð, fingu foreldrini tíð at hugsa seg um. Turið orkaði tó ikki at fortelja tað fyri seks ára gomlu døttrini beinanvegin.

- Tað var ræðuligt at fortelja tað fyri Lív. Eg hevði havt tíð at hugsa so nógv, at eg veruliga skilti, hvussu álvarsamt tað var, sigur Turið. Hon ringdi eisini til barnagarðin hjá Lív og greiddi teimum frá støðuni, so tey kundu hjálpa og stuðla Lív, meðan hon var í barnagarði.

### Tú kanst síggja høvdið

Lív spurdi ikki nógv og vísti ikki nógva sorg, men av tí at Turið hevði eitt so gott samskifti við pedagogin hjá døttirini, fann hon út av, at Lív eisini hugsaði nógv.

- Pedegogurin tók sær ómetaliga væl av Lív. Onkuntíð fór hon túrar einsamøll saman við henni og prátaði við hana. Og Lív segði meira fyri henni enn fyri mær, millum annað, at hon var bangin fyri, at eg fór at doyggja, greiðir Turið frá.

Ótilvitað royndu børnini nokk øll at verja mammuna, og tey høvdu eisini brúk fyri at vera glað og jalig. Meðan vit sita og práta, spyr Turið yngstu dóttrina, um hon minnist hinaferð, tá ið hon kom inn á wcið, tá mamman stóð og setti turriklæði á høvdi. Lív flennir og Turið fortelur:

- Hon sá sikkurt, at eg hevði grátið, og hon hugdi upp á meg og segði: Mamma, tú skalt ikki vera kedd, tí nú sleppur tú at síggja títt høvd, sigur Turið, og tey flenna øll.

Eldra dóttirin, Guðrun, sigur, at hon hugsaði um, hvat hon segði við mammu sína, meðan hon var sjúk.

- Áðrenn mamma gjørdist sjúk, skeldaðust vit báðar nokk so nógv, men meðan hon var sjúk, royndi eg ikki at skeldast við hana, tí so bleiv eg alt ov kedd, sigur Guðrun.

### At hava onnur

Tá Leivur hevði prátað við foreldrini, og tey høvdu greitt honum frá, at mamman hevði krabbamein, fór hann upp til vinmennirnar. Teir sótu og spældu playstation, og hann setti seg á seingina.



*Turið Horn hevur lagt stóran dent á opinleika mótvegis børnunum í sjúkratilgongdina. - Eg vil verja tey, men eg haldi, at eg verji tey best við at vera opin. Nú vita tey, at mann kann blíva fřískur, um mann fær krabbamein, og tey hava lært, at tað er okey at vera bangin, sigur mamma Leiv, Guðrun og Lív*


FFK

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

Grønlandsvegur 58. Boks 1216 . FO-110 Tórshavn

Tlf. +298-317959 . Telefax +298-315727 e-mail ffk@krabbamein.fo

The Faroese Cancer Society

**Tú kanst gera mun!**

Føroya Felag móti Krabbameini kannar, hvussu tað er

**At liva við krabbameini**

Við at luttaka í kanningini, ert tú við til at hjálpa øðrum

**Vilt tú taka lut ella vita meira um kanningina?**

Ring til 217957 ella 217959
ella send teldupost til
ffk@krabbamein.fo

Og vit senda tær
eitt spurnarblað



**Føroya Felag móti Krabbameini**

Sosialurin
www.sosialurin.fo